Búskaparligar og samfelagsligar avleiðingar av Covid-19

Covid-19 hevur fingið stórar partar av føroyska samfelagnum at steðga upp. Hetta ger, at framleiðslan verður minni. Seinastu árini hava Føroyar verið í einum hákonjunkturi, men nú eru vit á veg í eina minking, ið kann føra við sær ein lágkonjunktur. Sagt við øðrum orðum kann Covid-19 fara at elva til búskaparkreppu.

Leitið í "Samfelagið – eg og vit øll" eftir tølum, ið sýna nær Føroyar hava havt hákonjunktur og lágkonjunktur.

Í fyrstu syftu er tað serliga ferðavinnan, ið verður rakt, millum annað ferðafólkaflutningur loftvegis og sjóvegis. Ferðafólk sleppa ikki til Føroya. Nógv starvsfólk í gistingarhúsum, matstovum o.l. verða send heim, tí einki arbeiði er til tey.

Hvørji arbeiði eru beinleiðis ella óbeinleiðis knýtt at ferðavinnuni? Gerið hugarok í flokkinum.

Í aðru syftu verða aðrar privatar tænastuvinnar raktar, tí fólk fara ikki á kafe, til handils, til hárfríðkan o.s.fr. Tær tænastur, ið kunnu rekast gjøgnum Internetið, hava ein greiðan fyrimun.

Hvussu nógvir næmingar í flokkinum hava vegna Covid-19:
a) mist arbeiðið fyribils
b) fingið niðursetta arbeiðstíð
c) líka nógv arbeiði sum áðrenn
Teknið eina stabbamynd, ið sýnir tølini.

Tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar verða ikki líka hart raktar, tí tær í størri mun verða riknar við maskinum og teldum, eins og tað ikki er neyðugt við so nógvum beinleiðis sambandi við onnur fólk. Hinvegin hava útflutningsvinnurnar trupult við at fáa sínar vørur fluttar til onnur lond, og tí ansa tær eftir ikki at framleiða ov nógv.

Vel tíggju framleiðslustørv. Hvørji kunnu gerast uttan stórvegis smittuvanda? Hvørji hava við sær serliga stóran smittuvanda?

Størsta hóttanin móti føroyska búskapinum kemur møguliga úr útlondum. Um stór lond, ið vanliga keypa nógvar føroyskar vørur, koma í búskaparkreppu, fer eftirspurningurin at minka. Sum heild kunnu búskaparkreppur í øðrum londum lættliga raka Føroyar.

Kannið føroyskar miðlar. Hvørjar avbjóðingar hava ymiskar fyritøkur innan alivinnu og fiskivinnu vegna Covid-19?



Mynd úr "Samfelagið – eg og vit øll"

Hvussu kunnu vit bøta um búskaparligu støðuna?

Tá trupulleikar eru við búskapinum, ber til at reka búskaparpolitikk. Við búskaparpolitikki, ber til at forða fyri búskapakreppu ella forða fyri, at búskaparkreppan verður ov ring.

Kreppan, ið stendst av Covid-19 er ein stuttskygd kreppa. Í talvuni niðanfyri síggjast hvørjir stuttskygdir búskaparpolitikkir eru. Føroyar kunnu ikki brúka pengapolitikk og gjaldoyrapolitikk, men kunnu í staðin brúka fíggjarpolitikk og inntøkupolitikk.

Stuttskygdir búskaparpolitikkir (konjunkturpolitikkir)	Langskygdir búskaparpolitikkir (strukturpolitikkir)
- Fíggjarpolitikkur - Inntøkupolitikkur - Pengapolitikkur - Gjaldoyrapolitikkur	- Arbeiðsmarknaðarpolitikkur - Útbúgvingarpolitikkur - Vinnulívspolitikkur - Skattapolitikkur
(Penga- og gjaldoyrapolitikkur eru ikki yvirtikin málsøki)	

Mynd úr "Samfelagið – eg og vit øll"

15. mars 2020 legði Landsstýrið fram ein hjálparpakka til føroyska vinnulívið. Landsstýrið ynskir ikki, at føroyskar fyritøkur ella einstaklingar skulu fara av knóranum, og tí hava tey sett hálva milliard av til at stuðla teimum. Hjálparpakkin varð einmælt samtyktur av Løgtinginum 18. Mars 2020.

Fyrst og fremst sleppa fyritøkurnar undan at gjalda meirvirðisgjald (MVG) hesa komandi tíðina. Ætlandi skulu tær gjalda hetta seinni, tá kreppan er av. Harumframt kann danski grunnurin "Vækstfonden" vera við til at stuðla ávísum føroyskum fyritøkum.

Eisini hevur Landsstýrið gjørt tað lættari hjá fólki at fáa arbeiðsloysisstuðul og dagpening vegna Covid-19. Higartil hava tað bert verið fólk innan fiskavirking, ið hava fingið lønarendurgjald fyri mista arbeiðstíð, hóast tey ikki eru uppsøgd. Nú kunnu eisini onnur fólk, til dømis í ferðavinnuni ella handilsvinnuni, fáa lønarendurgjald, hóast tey ikki eru uppsøgd. Sostatt kunnu tey verða send heim eina tíð, men framvegis fáa løn.

Arbeiðsloysisskipanin er ein skipan, ið forðar fyri at lágkonjunkturar gerast ov ógvusligir. Hóast fólk ikki hava arbeiði, fáa tey løn og kunnu sostatt brúka pengar í handlum o.s.fr.

Høvdu vit ikki eina slíka skipan, kundu vit fingið eina "ónda ringrás", har kreppan verður alsamt størri og longri. Hetta hendi undir Kreppuni Miklu í 1990'unum, tá trygdarnetini undir borgarunum vóru sera vánalig. Í dag eru tey sera góð, og tí gerast kreppurnar eisini minni.

Brúkið keldurnar á komandi tveimum síðum til at læra meiri um hjálparpakkan hjá Landsstýrinum. Hvørji átøk halda tit eru best? Eru átøkini nóg góð? Eru dømi um fólk ella fyritøkur, ið ikki verða bjargað av hesum hjálparpakkanum?

Hjálparpakkin hjá Landsstýrinum

15. mars 2020 kunngjørdi Landsstýrið ein sonevndan hjálparpakka til fólk og fyritøkur. 18. Mars samtykti Løgtingið einmælt at seta hjálparpakkan í verk. Hetta fyri at tryggja, at Covid-19 ger so lítlan varandi skaða á føroyska búskapin sum gjørligt. Hjálparpakkin er settur saman av fýra lógarbroytingum, ið allar eru at finna á heimasíðuni hjá Løgtinginum.

- Løgtingsmál nr. 123/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
- Løgtingsmál nr. 124/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)
- Løgtingsmál nr. 125/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan
- Løgtingsmál nr. 126/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Leinki til tingmál á heimasíðuni hjá Løgtinginum: https://logting.fo/ → Tingmál

Myndin er ein partur av kunningini frá Landsstýrinum til almenningin um hjálparpakkan.



Beinleiðis leinki til kunningina frá Landsstýrinum:
https://www.uvmr.fo/fo/kunning/tidindi/hjalparpakki-til-folk-og-fyritokur/

Tíðindaskriv frá Vinnuhúsinum

Vinnuhúsið er áhugafelagið hjá føroysku arbeiðsgevarunum. Tey hava ofta fundir við politikararnar um hvussu búskaparpolitikkurin skal vera.

17. mars 2020 skrivaði Vinnuhúsið út eitt tíðindaskriv, har tey heittu á land og kommunur um at halda fram við virkseminum. Stórur partur av virkseminum hjá privatum fyritøkum fer til at tæna almenna geiranum. Til dømis veita KT-fyritøkur KT til skúlar, handverkarar byggja almennar bygningar o.s.fr.

Vinnuhúsið óttast, at um tað almenna gevst við sínum virksemi, fara nógvar fyritøkur at tjena ov lítið av pengum, soleiðis at tey mugu siga fólk úr starvi. Í ringasta føri kunnu fyritøkurnar fara av knóranum. Myndin høgrumegin vísir hvussu ein ónd ringrás kann vera við til gera kreppuna verri.



Mynd úr "Samfelagið – eg og vit øll"

Land og kommunur mugu halda gongd í virkseminum

Almennu myndugleikarnir eiga so vítt gjørligt at halda fast um virksemi, sum er sett út í kortið Hetta hevur alstóran týdning fyri føroyska búskapin, fyritøkur og starvsfólk teirra, nú tiltøkini at basa COVID-19 hava fingið umfatandi avleiðingar fyri vinnulívið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heitir staðiliga á kommunur og stovnar hjá landinum um ikki at avlýsa ordrar og ístaðin at bera so í bandi, at ætlað virksemi verður framt. Hetta er galdandi fyri allar vinnugreinar - lýsingar, bygging, umvæling, support, tænastur, veitingar o.s.fr.

Arbeiðsgevarafelagið skilir væl, at tað í summum førum kann vera trupult hjá almennum stovnum at skipa arbeiðið, men í tann mun tað yvirhøvur ber til, eiga planlagdar uppgávur at verða settar í verk. Á tann hátt kunnu vit avmarka neiligar avleiðingar fyri okkara vinnulív og búskap.

Samstundis er neyðugt at halda gongd í almennum funktiónum, sum hava týdning fyri vinnuligt virksemi.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur fult undir við greiðu fráboðanini hjá løgmanni um hetta.

- Vinnuhúsið

Beinleiðis leinki til tíðindaskrivið frá Vinnuhúsinum:
https://www.industry.fo/ti%C3%B0indi?Action=1&NewsId=2592&PID=11933